# Suðuroyingar fara aftur í sekstiárini hetta vikuskiftið

**Tónleikarar, sum spældu til dans við ymsum bólkum í sekstiárunum fara á pall í høllini í Trongisvági hetta vikuskiftið**

AFTURTRÁ
*Áki Bertholdsen*

Øll tey eldru í Suðuroy, sum vilja minnast gamlar dagar og øll tey yngru, sum vilja vita, hvussu tað var at fara í býin í gomlum døgum, kunnu gleða seg til vikuskiftið.

Leygarkvøldið verður nevniliga stórt tiltak í ítróttarhøllini í Trongisvági, har litið verður afur um bak, heilt aftur í sekstiárini.

Tá fara fleiri av teimum gomlu orkestrunum, sum spældi til dans á Tvøroyri í sekstiárunum og kanska eitt sindur inn í sjeytiárini, á pallin í ítróttarhøllini.

Tá á døgum vóru nógv orkestur á Tvøroyri og trý av teimum fara at spæla leygarkvøldið.

Ætlanin er at byrja klokkan 11 leygarkvøldið - og ætlanin er at byrja stundisliga.

Tey gomlu orkestrini, sum fara at spæla, eru Virvar, Beat Shots og Assorted Creams. Harafturat verður Maibritt úr Hørg eisini við.

Tey fara at spæla einar seks til 10 sangir í part og tónleikurin verður tað, sum var at hoyra tá á døgum, Elvis Presley, Shadows, Sven Ingvars, Creadens Clearwater Revival o.s.fr.

Annars fara Trio at spæla til dans.

Eyðvitað hava allir hesir bólkarnir havt skiftandi manning, ta tíðina, teir spældu, og onkrir ídnir tónleikarar frá hesi tíðini eru farnir undir grønu torvu, eitt nú spældu Arthur Djurhuus og Símun Nielsen við Virvar og Rudolf Niclasen spældi við Stjørnuni og Beat Shots.

Men teir, sum spæla við, eru allir tónleikarar frá teirri tíðini.

Beat Shots er mannaður við Albert Johannesen, Paula Einarsson, Finn Thomsen og Errolf Thomsen. Í Virvar spæla Kári Niclasen, Vilhelm Meyer, Jens Johannesen og Finn Thomsen. Í Assorted Cream eru tað Kristian Petersen, Anton Øster, Jens Johannesen og Finn Thomsen.

Hesa seinastu tíðina hava bólkarnir vant eitt sindur, so teir eru ikki ófyrireikaðir, teir fara á pallin.

Tað er Gamlaársnevndin, sum skipar fyri tiltakinum. Atgongumerkið kostar 100 krónur.

# Fáminingar mugu læna kvotu



*Bygdaráðið í Fámjin ásannar, at nógv liggur á láni og tí eru íløgur stórar upp á seg. Bygdaráðið hevur einmælt samtykt fíggjarætlanina fyri komandi ár. Her eru tað f.v. Magnus Ellendersen, næstformaður, Hans Joensen, Arni Nielsen og Niels Jacob T. Nielsen. Borgarstjóri er Elin Nielsen*

**Fámjin er ein bygd, sum er væl fyri. Næsta ár fer Kommunan at gera íløgur fyri 1,4 millión og tí mugu tey læna íløgukvbotu frá hinum kommununum í oynni**

FÁMJIN
*Áki Bertholdsen*

Fámjin er ein av teimum kommununum, sum er eina best fyri í landinum upp á seg. Hon skyldar ikki eina krónu og inntøkurnar eru javnt góðar.

Men samstundis ásannar Bygdaráðið, at nógv liggur á láni og tað merkir eisini fíggjarætlanina hjá kommununi fyri komandi ár.

Á fundi í seinastu viku samtykti Bygdaráðið fíggjarætlanina einmælt.

Eftir henni skal Fámjins Kommuna næsta ár gera íløgur fyri 1,4 millión. Tað er nógv meiri, enn kommunan kundi gjørt eftir íløgukvotuni, hon hevur. Tí hevur kommunan verið noydd til at læna íløgukvotu frá øðrum kommunum í Suðuroy, sum ikki brúka sína kvotu næsta ár.

Annars verður mett, at kommunuskatturin í Fámjin næsta ár verður 1.950.000 krónur, men harumframt fær kommunan 80.000 í rentuinntøkum, samstundis sum hon ikki hevur eitt oyra í rentuútreiðslum. Restin av íløgunum, 900.000 krónur, verður tikið av pengunum, sum kommunan hevur á bók.

Av tí, at so nógv liggur á láni, heldur kommunan ikki, at tað er rætt at lækka skattaprosentið, hóast kommunan kundi havt ráð til tað.

Av tí sama er skattaprosentið aftur 16% næsta ár og barnafrádrátturin er 5.000 krónur fyri hvørt barnið.

Av íløgum, sum kommunan skal gera, er tað fyrst og fremst vegurin í bygdini, sum skal gerast, umframt renovatiónsplássið og kloakkir.

Ætlanin at brúka 500.000 krónur uppá ein veg í bygdini, sum er rættiliga illa farin. Talan er um vegin inn í Hviltabotn, sum tað eitur, tað er vegurin inn til kirkjugarðin. og ætlanin er nú at gera hann so góðan, at bilar kunnu koyra eftir honum.

Harumframt er ætlanin at gera kloakkir fyri 400.000 krónur og ætlanin er eisini at brúka uppá skúlahúsini, sum kommunan eigur. Enn er ikki greitt, hvat kommunan skal brúka húsini til, men Bygdaráðið heldur ikki at tað er rætt, at tey skulu forfella.

Annars skulu stórar íløgur gerast í vatnbrunn.

Í Fámjin búgva 110 fólk.




# Seyðasýning í Hvalba leygardagin

**Leygardagin verður seyðasýning í Hvalba. Seinni verður oyggjarfinala**

SEYÐASÝNING
*Áki Bertholdsen*

Leygardagin verður aftur seyðasýning í Hvalba. Hetta er aðru ferð í ár, at seyðasýning er í Hvalba. Fyrru ferðina vóru tað veðrarnir, sum vórðu sýnaðir, men hesuferð verða tað veðurlombini, sum stóðu fyri tørni.

Sýningin verður uttan fyri Roynhøllina og hon byrjar klokkan 13. Hesuferð verður eitt sindur meiri gjørt burturúr, enn teir plaga. Eitt nú fer MBM at hava eina framsýning inni í Roynhøllini við ymsum útbúnaði og ymsari útgerð til seyðahald.

Somuleiðis verður burturluting, har vinningarnir eru eitt lamb, kikari, karamellur og kraftfóður. Í Hvalba hava seyðasýningar verið síðani 1994. Dómarar vera aftur hesuferð Petur Karl av Rana, Ásmund Bærentsen, Óli í Hjøllum og Frits Poulsen. Teir, sum eiga tey vakrastu lombini, fáa eisini steyp.

Í heyst hava seyðasýningar verið í flest øllum bygdum í Suðuroynni. Umframt í Hvalba, hava sýningar hava verið í Sumba, Porkeri og í Hovi.

Seinni, helst annað vikuskiftið, verður so ein oyggjarfinala, har allir teir, sum hava fingið steyp í teimum ymsu sýningunum, vera við.

# Kunnu fáa meira burturúr fiskinum

*Geir Wilhelm Wold sigur, at tað krevur nógv at fara undir at virka tann partin av fiskinum, ið ikki fer til høvuðsframleiðsluna*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Fiskur hevur nógvar aðrar møguleikar enn flak, sum er tað mest vanliga at framleiða av fiski. Restin av fiskinum kann vera meira verd enn flakið, og tí kann tað vera stórur vinningur í at virka restina av fiskinum, sum vanliga verður tveitt burtur**

VIRÐISØKING
*Stefan í Skorini*

Hetta hava norðmenn prógvað. Har hava fyritøkur sum Maritex lagt seg eftir at viðgera tann partin av fiskinum, ið vanliga verður tveittur burtur. Hetta hevur við sær eina stóra virðisøking av ráværuni, og væntandi fer henda vinnan veruliga at taka dik á seg komandi árini.

Norrøna Atlantssamstarvið (NORA) skipar í hesum døgum fyri eini ráðstevnu í Norðurlandahúsinum, ið hevur heitið »Økonimisk vækst og nye vækstmuligheder i Nordisk Atlantregion«. Løgmaður setti stevnuna mikumorgunin.

Í hesum sambandi eru fólk úr hinum Norðurlondunum komin til landið at hava fyrilestrar um teirra royndir og úrslit. Fyrst á skránni mikudagin var nýskapandi viðgerð av ráevnum úr havinum, og hvussu meira kann fáast burturúr fiski sum heild.

## Stórir møguleikar

Eingin ivi er um, at stórir møguleikar eru í hesi vinnuni. Í Noregi eru fleiri fyritøkur, ið útvinna vørur úr tí partinum av fiskinum, ið ikki verður nýttur til flak ella aðra væl kenda framleiðslu.

Bara umleið 35% av einum fiski verður nýtt til flakið. Hin parturin fer til hjáframleiðslu. Nógvir møguleikar eru at vinna ymiskar vørur úr hesum partinum.

Fóður, fiskamjøl, heilsukostur av ymsum slag, kosmetik, proteinir og lýsi eru nakrar av teimum vørunum, ið kunnu útvinnast.

Geir Wilhelm Wold er stjóri í norsku fyritøkuni Maritex, og hann greiddi eitt sindur frá teirra virksemi. Verksmiðjan hjá teimum byrjaði við at virka toskalivrar. Síðani er framleiðslan økt, so at hon nú eisini umfatar fiskahøvd, magan, rogn, ryggjastykki, livrar og annað. Framleiðslan er tí sera fjølbroytt í dag.

Fyritøkan er væl fyri í dag og hevur ein partapening á einar 80 milliónir norskar krónur. Hon hevur lagt seg eftir at virka tann partin av fiskinum, ið vanliga ikki verður nýttur. Hetta hevur eydnast avbera væl.

Geir Wilhelm Wold sigur, at tey hava roynt at fáa fulla úrtøku úr ráværuni, ið verður førd til lands.

Hetta verður ikki gjørt í Føroyum. Men Sigrun Bekkevold úr Noregi væntar, at henda menningin fer at breiða seg til øll Norðurlond og kanska um allan heim. Føroyingar eiga tí at fara at hugsa um hesar møguleikarnar.

Tey bæði Sigrun og Geir eru á einum máli um, at tað krevur nógv at fara í gongd við slíka vinnu. Almennnu myndugleikarnir mugu vera við í menningini, og tað krevur stóra vitan um hesa vinnuna. Eisini er umráðandi at hava altjóða marknaðin fyri eygað og ikki bara at hugsa um nærmastu grannarnar.

## Stór virðisøking

Sigrun Bekkevold starvast hjá RUBIN í Noregi, og endamálið hjá hesum stovni er at skapa virðisøking av ráværuni í havinum. Hon sigur, at virðisøkingin hevur verið umleið ein milliard um árið.

Hon væntar harafturat, at áðrenn tíggju ár eru liðin, verður henda hjáframleiðslan meira verd enn høvuðsframleiðslan av ráværuni fiski.



*Nógv fólk úr vinnuni var í Norðurlandahúsinum mikudagin, og tey hava óivað fingið okkurt gott hugskot*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Loftslistin vann

**Fimm av teimum átta limunum í kirkjuráðnum í Klaksvík vóru valdir á loftslistanum**

VAL
Eyðun Klakstein

**Klaksvik:** Tríggir listar vóru til kirkjuráðsvalið í Klaksvík, og tað gjørdist listi 1, sum fekk fimm av teimum áttu limunum í ráðnum.

Av hesum lista, sum tey plaga at rópa loftslistin, vóru Karl Gudmund Henriksen, Jákup Dion Frederiksen, Jaspur Petersen, Rannvá Joensen og Terji Kjærbo vald í kirkjuráðið.

Listi 2, sum serliga er mannaður við fólki úr Emmaus, fekk eitt umboð í kirkjuráðið, og tað gjørdist Tummas Lervig.

Triði listin, sum serliga umboðaði KFUM & K, fekk tveir limir. Ólavur í Mittúi Christiansen og Ågot Poulsen vóru vald í kirkjuráðið.

Nýggja kirkjuráðið tekur við fyrsta sunnudagin í advent.

# Bilstevna í Klaksvík

**Klaksvík:** Leygardagin og sunnudagin skipar Klaksvíkar Ítróttarfelag fyri stórari bilstevnu í KÍ-høllini.

Bilstevnan í Klaksvík er vorðin afturvendandi táttur, og á hvørjum ári eru tað fleiri, sum nýta høvi til at keypa sær nýggjan bil.

Bilasølurnar, sum verða við hesaferð, eru Reyni Service, Nordbil, Ivan Johansen, Esmar Simonsen, Bilfríðkan og Suzuki. Harafturat fer P/F Hansen at hava viðfestivognar á stevnuni

Stevnan verður opin leygardagin og sunnudagin frá kl. 15.00 til 21.00.

Í sambandi við bilastevnuna undirhalda klovnarnir Fjotti og Bobo í Lognbrá. Hetta verður leygardagin kl. 17.00, og atgongumerkini, sum verða keypt til klovnaundirhaldið, kunnu eisini brúkast til sjálva bilstevnuna.